FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Mannagongd viðv. strongd

Hesin politikkur fevnir um øll stig av strongd, tað vil siga, bæði lættari farandi strongd, varandi strongd og strongd, sum hevur við sær sjúkrafráveru frá arbeiðinum. Strongdarpolitikkurin hjá Fróðskaparsetri Føroya byggir á felags álit millum starvsfólk og leiðslu.

## Endamál

Endamálið við strongdarpolitikkinum er í samstarvi millum leiðslu og starvsfólk, at:

- Fáa størri vitan um strongd
- Burturbeina orsakir til strongd
- Minka um sjúkrafráveru, sum er grundað á strongd
- Tikið verður hond um starvsfólk, sum eru strongd, á ein virðiligan hátt
- Skapa eitt sunt, trygt og virkið arbeiðspláss, har trivnaður og rakstrartryggleiki eru góð.

Endamálið við hesum politikki er eisini at hava umsorgan bæði fyri starvsfólkinum, sum hevur strongd og starvsfólkunum, sum arbeiða saman við viðkomandi. Ein partur av hesum eru umsorganarsamrøður í sambandi við strongd.

## Hvat er strongd

Nógv ymisk viðurskifti kunnu føra til strongd. Tó vísir tað seg, at strongd ofta stavar frá viðurskiftum í arbeiðinum.

Strongd í sjálvum sær er ikki ein sjúka. Tó kann áhaldandi strongd føra til bæði likamligan og sálarligan heilsuskaða. Áhaldandi strongd kemur ikki eftir einum degi, men er ein stigvís gongd, ið kann taka mánaðir og ár, áðrenn støðan gerst álvarsom. Strongd, ið er tongd at arbeiði, stendst ikki av einstaklinginum, men av trupulleikum í bygnaði ella fyriskipan av arbeiðinum. Arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av at tryggja, at starvsfólk ikki fáa sálarligt ella likamligt mein av arbeiðinum.

## Hví er tað umráðandi at fyribyrgja strongd?

Sálarligt arbeiðsumhvørvi hevur stóran týdning fyri bæði heilsu og vælveru hjá einstaka starvsfólkinum. Eru starvsfólkini væl fyri, trívast, mennast og hava tey tað gott likamliga og sálarliga, so kemur eisini meiri burturúr, tá ið tey eru til arbeiðis.

Eru starvsfólkini harafturímóti strongd og gerast illa fyri ella sjúk orsakað av umstøðum ella viðurskiftum á arbeiðsplássinum, kann hetta hava við sær sjúkrafráveru í styttri ella longri tíð. Fyri arbeiðsplássið kann hetta fáa kostnaðarmiklar avleiðingar.

Av tí at strongd í sjálvum sær ikki er ein sjúka, men er ein støða, sum kann elva til sjúku, er umráðandi at gera nakað við tey viðurskifti og arbeiðsumstøður, ið elva til strongd. Fyribyrging og handfaring av strongd kann verða við til at verja fyri, at starvsfólk ikki gerast sjúk av strongd og noyðast at verða burtur frá arbeiði.

**Fyribyrging av strongd**
Fyribyrging av strongd krevur, at bæði leiðsla og starvsfólk leggja orku og tíð í fyribyrgingina. Fyrsta stigið er opinleiki, bæði frá starvsfólki og leiðslu. Opinleiki krevur tíð og dirvi, men aloftast uppliva starvsfólk opinleika sum ein stóran lætta. Við opinleika verður sipað til samskifti og samstarv um ítøkilig viðurskifti í arbeiðinum, ið eru atvold til strongd.

**Hvat er leikluturin/ábyrgdin hjá leiðsluni og starvsfeløgum**
Leikluturin hjá starvsfeløgum og hjá leiðsluni er, at:
*Staðfesting*
- Gáa eftir um starvsfólk vísa tekin um strongd
- Hava áhuga fyri hvør øðrum
- Hava fokus á trivnað og sjúkrafráveru

*Fyribyrging*
- Hava virðing fyri, at uppgávur verða loystar
- Hava góðan samskiftistóna, og tosa pent um og við hvønn annan. Gera nógv burturúr tí sosiala á arbeiðsplássinum

*Handfaring*
- Fráboða trupulleikar til nærmasta leiðara, ella álitisfólk
- Fara væl um starvsfelagar, sum eru og hava verið sjúkir
- Hjálpa við loysnum.

## Tekin um, at strongd er millum starvsfólkini

Tað finnast fleiri ávaringartekin um, at starvsfólk møguliga eru strongd. Arbeiðsgevari og leiðsla kunnu tá varnast, at á arbeiðsplássinum og millum starvsfólkini eru:

- Samstarvstrupulleikar og nógvar konfliktir
- Samskiftistrupulleikar og trupulleikar í mun til leiðsluna
- Lítil arbeiðshugur og lítil motivatión
- Økt útskifting av starvsfólki
- Økt sjúkrafrávera

## Hvat er ábyrgdin hjá leiðsluni

- Umsorganarsamrøður
  - Umsorgarnarsamrøður verða hildnar, tá ið leiðari gerst varugur við, ella verður gjørdur varugur við, at eitt starvsfólk hevur strongd
- Veita neyðuga hjálp innan fyri givnan karm – sí mannagongdina "Heilsuhjálp til starvsfólk"
- Møguliga at leiðslan sjálv tekur støðu til at fyribyrja strongdini, við at minka um arbeiðsbyrðuna
- Fyribyrging av strongd áðrenn sjúkan traðkar inn
- Tryggja trivnaðin
- Greiðar mannagongdir um at tillaga uppgávurnar, tá ið viðkomandi kemur aftur til arbeiðis.

## *Hvør skal kunnast*

Nærmasti leiðarin hevur ábyrgd av at kunna nærmastu starvsfelagar um fráveru – mælt verður til, at mann brúkar bleytar orðingar um fráveruna, og at hetta verður gjørt í samráð við starvsfólkið, sum er rakt av strongd.

Fyri at fáa eitt trygt og heilsugott arbeiðsumhvørvi krevst, at bæði arbeiðsgevari, leiðsla, trygdarumboð/skipan og starvsfólk samstarva.